Føroyski fólkaskúlin skal kannast

– Tað er átroðkandi við nýggjum kanningum av føroyska fólkaskúlanum við øktum eftirmetingum og kvalitetskanningum, sigur næstformaðurin í Føroya Lærarafelagi, Magnus Tausen. Hann metir fakliga støðið í føroysku skúlunum vera hægri enn tað, nýggj OECD kanning í Danmark ber boð um, hóast fleiri aðrir trupulleikar eru vaksandi

– Er tað rætt, at vit hava 40 ára gamlar skúlar við 25 næmingum í hvørji stovu, spyr Magnus Tausen, næstformaður í Føroya Lærarafelagi

Mynd: Jens Kristian Vang

FÓLKASKÚLIN
Heini í Skorini
heini@sosialurin.fo

Í gjár kastaði Sosialurin ljós á nýggja OECD kanning um danska fólkaskúlan, sum varð almannakunngjørd í seinastu viku. Úrslitið var, at álvarsom sjúkueyðkenni eru at hóma millum danskar fólkaskúlanæmingar á fakliga økinum, har stórur partur antin ikki dugir at lesa ella eru funktionellir analfabetar á annan hátt, tá fólkaskúlaskeið teirra er liðugt.

Føroysk kanning

Ongar slíkar kanningar eru gjørdar fyri føroyska fólkaskúlan, men av tí at vit nýta so at siga somu fólkaskúlalóg og sama leist sum danir, er áhugavert at vita, um tað stendur eins illa til í Føroyum, og um vit ikki eisini hava brúk fyri at kanna okkara fólkaskúlastøði. Næstformaðurin í Føroya Lærarafelagi, Magnus Tausen, sigur seg prinsipielt vera atfinnandi mótvegis slíkum kanningum, men samstundis mælir hann til, at vit fara undir at granska og kanna føroyska fólkaskúlan við støði í okkara egnu viðurskiftum.

– Tað er avgjørt átroðkandi við nýggjum kanningum av føroyska fólkaskúlanum, og leypandi eftirlit, evalueringar og kvalitetskanningar er nakað, vit ongantíð ov skjótt eiga at stinga út í kortið, sigur Magnus Tausen, sum dagliga starvast sum lærari í Tórshavnar Kommunuskúla. Men í sama viðfangi vísir Magnus á, at slíkar kanningar, sum OECD júst hevur framt í Danmark, eins væl kunnu vera skaðiligar, um teir ikki verða gjørdar við røttum motivum og anda.

– Slíkar kanningar, sum OECD júst hevur staðið fyri í Danmark, taka altíð støði í ávísari skipan við ávísum kriterium, og tí er ikki vist, at vit kunnu nýta somu kanning í Føroyum, sigur Magnus Tausen. Hann heldur, at føroyski politiski myndugleikin skuldi sett nevndir at endurskoða, granska og kanna fólkaskúlan, men ein fortreyt fyri hesum er felags stev og samstarv.

– Niðri hevur OECD kanningin elvt til eitt stríð millum politikarar og lærarafelagið, har kanónin serliga verður vend móti lærarafelagnum, og tá er slík kanning uttan nyttu, slær næstformaðurin í lærarafelagnum fast. Hann leggur dent á, at fortreytin fyri menning er eitt samstarv, og í Føroyum skuldi hetta verið fingið í lag millum t.d. pedagogfelagið, lærarafelagið og politiska myndugleikan. Saman skuldi átak sambært Magnus verðið framt at hyggja nærri at, hvussu vit veruliga eru fyri samanborið við umheimin á fólkaskúlaøkinum.

– Tí eftirlýsi eg, at vit ogna okkum innlit í støðið á skúlum okkara, uttan at kanónin verður vend móti nøkrum, slær Magnus Tausen fast.

Atferðartrupulleikar økjast

Lærarin í Tórshavnar Kommunuskúla metir ikki, at fakligi førleikin hjá føroyingum er eins vánaligur, sum hann sambært OECD kanningini er í Danmark. 18% av donsku fólkaskúlanæmingunum duga sambært hagtølunum ikki at lesa eftir lokið fólkaskúlaprógv, umframt at stórur partur sigst vera analfabetar, men Magnus er bjartskygdari um føroyska ungdómin.

– Hóast eingi tøl fyriliggja, eri eg vissur í, at hetta talið er minni í Føroyum, og vit hava avgjørt færri funktionellar analfabetar við loknum fólkaskúlaprógvi, sigur Magnus Tausen. Ein høvuðsorsøk til hetta er sambært Magnus, at føroyingar ikki hava eins nógvar fremmandar tilflytarar í skúlunum, sum hava verri at fóta sær fakliga, og hetta bøtir sjálvsagt um viðurskiftini.

– Hinvegin lesa føroyskir næmingar nógv minni nú enn áður, umframt at fleiri og fleiri næmingar hava grundleggjandi atferðartrupulleikar, og hetta eru álvarsamir og nýggir trupulleikar, vit við møguligari kanning og øktari gransking kundu fingið staðfest og farið í hernað ímóti, sigur næstformaðurin. Hann nevnir eitt prát, hann fyri stuttum hevði við lærara, sum byrjaði við einum 1. flokki fyri tiggju árum síðani, og sum so aftur byrjaði við einum 1. flokki fyri stuttum.

– Sambært hesum lærara er grundleggjandi atferð næminganna høvuðsmunurin í dag samanborið við fyri tiggju árum síðani, og hetta er broytt til tað verra. Umframt tað eru næmingarnir nógv verri og seinni at lesa í dag enn áður, slær Magnus fast. Hann heldur, at hetta í ein mun er orsakað av tøknifrøðiligu kollveltingini seinastu árini, samstundis sum baklandið hjá alt fleiri næmingum ikki tykist vera nøktandi. Hesar grundleggjandi sosiologisku og sálarfrøðiligu orsøkir elva til høvuðstrupulleikarnar, og hetta kann lærarafelagið sambært næstformanninum á ongan hátt ákærast fyri, sum tað t.d. verður í Danmark í hesum døgum.

– Við hesum hevur skúlin fingið álagt nógv fleiri og størri uppgávur enn áður, tí umframt at undirvísa skulu lærararnir eisini vera t.d. sálarfrøðingar, sigur Magnus. Hann saknar og mælir harðliga til, at eftirútbúgvingar til lærarar verða raðfestar, so teir kunnu endurnýggjast og fylgja við nýggju trupulleikunum í nútiðini, umframt at skúlarnir kundu veitt mæmingum við trupulleikum professionella sálarliga hjálp.

Samstarv

Donsku politikararnir hava í hesum døgum sum sagt úr at gera at finnast at danska lærarafelagnum í kjalarvørrinum av áðurnevndu kanning, men Magnus Tausen heldur, at trupulleikarnir ofta eru nógv djúpari og meiri grundleggjandi enn bert at ákæra lærararnar.

– Sum fakfelag góðtaka vit als ikki, at kanning verður gjørd, sum bert elvir til atfinningar mótvegis lærarunum, so um slík kanning verður gjørd í Føroyum, má talan vera um eitt samstarv millum ymsar bólkar heldur enn eitt álop á lærararnar, slær Magnus Tausen fast. Men hann undirstrikar samstundis, at lærararnir sjálvsagt taka ímóti atfinningum, og at teir á summum økjum kundu gjørt sítt arbeiði betri.

– Hóast ónøktandi arbeiðsumstøður skal eg tó leggja afturat, at fólkaskúlanæmingar sleppa alt ov lætt, tí vit lærarar eru mangan ov dovnir og seta ikki nóg høg krøv til næmingarnar, vísir Magnus Tausen á. Fyri veruliga at fáa greiðu á viðurskiftunum heldur Magnus tí, at kanningar skuldu verið gjørdar, so vit fáa staðfest, hvat er gott, og hvat liggur á láni.

– Á henda hátt høvdu vit ítøkiliga avdúkað trupulleikar og eginleikar í føroyska fólkaskúlanum, og er hetta tí ein avbjóðing til politiska myndugleikan at stinga út í kortið, sigur Magnus Tausen.

Hann sigur, at í løtuni fer eingin gransking fram á fólkaskúlaøkinum, og at einki innlit tí fæst um fólkaskúlaskipan okkara. Nógvir grundleggjandi spurningar um fólkaskúlan hanga í leysum lofti, og innlit er ein fortreyt fyri, at myndugleikar og fakfeløg saman seta sær nøkur mál og velja eina felags menningarleið fyri okkara næmingar.

– Er tað rætt, at vit hava 40 ára gamlar skúlar við 25 næmingum í hvørji stovu? Skulu vit leggja okkum eftir sentralari skúlastýring mótvegis lokalsamfelagsligum atlitum? Skulu vit leggja størri dent á sálarliga hjálp til næmingar? Hetta eru nakrir fáir av mongum spurningum, vit hava brúk fyri at vita, og tí mugu vit saman seta fólkaskúlan undir sjóneyku, slær Magnus Tausen á enda fast.

Sostatt er bólturin spældur yvir til Mentamálaráðið at taka nýggj initiativ at menna fólkaskúlan við nýggjum og afturvendandi kanningum, og mentamálaráðharrin úttalar seg í næstu útgávu um málið.

Aðalfundur við fyrilestri
"DONG á djúpum vatni"

Vit bjóða til aðalfund 2. juni 2004 kl. 19.00 á Hotel Føroyum

Jan Terje Edvardsen, Senior Vice President, Exploration hjá DONG hevur framlegu.

Fundarskrá
Kl. 19.00 Vælkomin
Kl. 19.30 Formaðurin setur Oljutingið
Kl. 19.35 Aðalfundur
1. Val av fundarstjóra
2. Frásøgn nevndarinnar um virki felagsins í farna roknskaparári
3. Framløga av ársroknskapi við grannskoðaraátekning til góðkenningar
4. Val av nevnd
5. Val av grannskoðara
6. Ymiskt.
Kl. 20.00 Jan Terje Edvardsen, Senior Vice President, Exploration, leggur fram um teirra strategi og vánir til Atlantsmótið.
Kl. 20.40 Spurningar frá áhoyrarum
Kl. 20.50 Matur og drekka

DONG stuðlar tiltakinum.

Vinarliga boða Vinnuhúsinum frá luttøku á telefon 311864 ella umvegis teldupost: industry@industry.fo.

Vælkomin

Vinarliga
Oljutingið

OLJUTINGIÐ
Petroleum Association of the Faroe Islands

Reklama: 341000

Føroyingur besta uppskotið í New York

Altjóða arkitektakapping varð útskrivað, tá tað gjørdist greitt, at New York skuldi hava nýggjan býling til olympisku leikirnar, um býurin fekk leikirnar í 2012. Ein føroyingur var við í kappingini, og úrslitið av arkitektakappingini er kunngjørt

– Vit lógu væl við, og fakligt innstillaðu teir okkum, sigur Ósbjørn Jacobsen, arkitektur

ARKITEKTAKAPPING
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo

Á málstrikuni. Tað er fyrsta viðmerkingin hjá Ósbjørn Jacobsen, tá vit spyrja hann um úrslitið av arkitektakappingini.

– Tíverri vunnu vit ikki. Vit hava bara fingið at vita, at vit vóru við til allar síðst. Tað stóð millum tvey uppskot, og harav var tað eina okkara, men teir valdu so hitt uppskotið fram um okkara. Vit hoyrdu, at vit vórðu innstillaðir av sjálvum tí Fakliga Ráðnum, tað vil siga arkitektar og planleggjarar, men í sjálvari tí prosessini skulu teir hava politiskan stuðul, og har vórðu vit so sílaðir frá, sigur Ósbjørn Jacobsen.

Fimm uppskot vóru við, tá endalig avgerð skuldi takast um vinnaran. Ósbjørn Jacobsen hevur teknað uppskotið saman við tveimum øðrum frá Henning Larsens Tegnestue. Heilar 130 teknistovur vóru við frá byrjan, men hetta talið varð sílað niður á fimm tær bestu, og harímillum var teknistovan hjá Ósbjørn Jacobsen.

Sjálvt um Henning Larsens Tegnestue ikki vann kappingina, so segði Ósbjørn, áðrenn úrslitið varð kunngjørt, at royndirnar telja nógv.

- Eg havi verið við í fleiri øðrum stórum kappingum fyrr og veit av royndum, at um man ikki vinnur, so hendir lítið og einki annað enn at man fer víðari til næstu verkætlan nakrar royndir ríkari, segði Ósbjørn við Sosialin tann 22. mai, fimm dagar undan kunngerðini av vinnaranum.

– Vit lógu væl við, og tað ljóðaði sum um, at fakligt innstillaðu teir okkum. Men tá alt varð tikið við, og politikararnir vórðu tiknir inn í tað, tá valdu teir eitt annað projekt, sigur Ósbjørn Jacobsen, arkitektur.

Sum grøvin

Fyrrverandi landsfornfrøðingin, Arne Thorsteinsson, hevur onga viðmerking til loysnina hjá landsstýrismanninum í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, á Fornminnisavninum. Okkurt bendir á, at hann hevur fingið munnkurv í málinum

Okkurt bendir á, at Arne Thorsteinsson hevur fingið munnkurv í málinum um rokið á Fornminnisavninum.

Mynd: Savnsmynd

ROKIÐ Á FORNMINNISAVNINUM
Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin

Arne Thorsteinsson varð offraður í loysnini hjá Mentamálaráðnum. Hetta er fatanin hjá fólki, ið kenna viðurskiftini á Fornminnisavninum. Hetta var niðurstøðan hjá Útvarpi Føroya í tíðindunum mikukvøldið.

Høvuðspersónurin sjálvur vil ikki gera nakrar viðmerkingar til avgerðina hjá Jógvani av Lakjuni. Spurdur, um hann hevur fingið munnkurv, svarar Arne Thorsteinsson, at tað hevur hann onga viðmerking til.

Vit ætlaðu at spyrja fyrrverandi landsfornfrøðingin um hann heldur, at loysin á fornminnisavninum er virðilig, og um hann væntar, at friður fer at valda á stovninum í framtíðini, nú Steffen Stumman Hansen heldur fram á stovninum.

Vit ætlaðu eisini at spyrja um hann kennir seg offraðan, og um avgerðin hjá Jógvan á Lakjuni kann tulkast sum, at hann var høvuðsorsøkin til ófriðin á stovninum.

Arne Thorsteinsson er kortini sum grøvin, og hevur onga viðmerking til málið.

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

Marknaðarfólk

STARV sosialurin

Ert tú fyrikomandi, dugir tú væl at selja, ert tú álítandi, røkin og dugur at arbeiða sjálvstøðugt, so ert tú júst tann persónurin, sum vit leita eftir.

Til marknaðardeild okkara søkja vit eftir starvsfólki, sum kann vera viðvirkandi til framhaldandi at menna inntøkugrundarlag okkara, og sum í ávísan mun eisini kann átaka sær leiðsluupp-gávur.

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku bløðunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa og ikki minst arbeiða viðari við góðum hugskotum. Kundarøkt, account-management og telemarketing eru eisini arbeiðsuppgávur, sum vit framyvir koma at leggja enn størri dent á, og kemur starvið eisini partvíst at fevna um hesi øki.

Í samstarvi við starvsfelagarnar á marknaðardeildini verður tú eisini við í dagligu framleiðsluni av blaðnum. Herundir tilrættislegging av lýsingarátøkum, temabløðum og lýsingartilboðum.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Jonhard Hammer, marknaðarleiðara, á tlf. 341800. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á jonhard@sosialurin.fo

Umsóknarfreistin er 11. juni, og skal umsóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

Sosialurin
Marknaðardeildin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.